# Bangin filmur um ræðlsu

**Nógv umrøddi filmurin hjá høgrapolitikaranum, Geert Wilders, um islam og Koranina er ein einoygdur vitnisburður frá eini bangnari sál, ið er um at missa trúnna á alt og sjálvan seg**



*Júst hetta er bæði veikleikin og styrkin í demokratinum. At kunna rúma øllum meiningum, staðfestingum og listarligum útsøgnum.*

*Birgir Kruse, filmsummælari*

*Wilders* ***vil*** *ikki skilja muslimar. Hann vil skilja seg* ***frá*** *teimum. Undir einum eru tey orsøkin til allan heimsins djevulskap í okkara tíð. Tað er boðskapur Wilders.*

*Birgir Kruse, filmsummælari*

UMMÆLI

*Birgir Kruse*

Niðurlendski høgrapolitikarin við tí sjáldsama hárinum, Geert Wilders (f.1963), hevur nú roynt seg við filmiskum amboðum. Tað ger hann við stuttfilminum *Fitna*, sum lýsir og staðfestir muslimskan ágang í okkara tíð.

Filmurin er lagdur á netið, so allur heimurin kann síggja boðskapin. Í so máta er Wilders effektivur, sum eingin annar. Hóast betra borgarskapið og dannaði hampafólk annars muta í móti, so er og verður tað Wilders, ið setur skránna og fær seinasta orðið.

Júst hetta er bæði veikleikin og styrkin í demokratinum. At kunna rúma øllum meiningum, staðfestingum og listarligum útsøgnum.

**Mikil øsing**

Filmurin, ið varir 16 minuttir og onkustaðni er kliptur niður til 10 minuttir, varð lagdur á netstaðin *Liveleak* 27/3-2008. Øsingin varð so mikil, at tey strikaðu filmin. Men tá var hann longu farin um allan heim og goymdur í ymsum útgávum á *YouTube*, sum Google eigur. Skrivar tú teg inn her og váttar, at tú ert 18, so ber til at síggja henda sjáldsama niðurlendska dokumentarfilmin um islam og Koranina.

Filmurin *Fitna* tekur støði í nøkrum ørindum úr Koranini. Ørindini heita á hin rættrúgvandi, at breiða út trúnna og drepa fyri hond tað, sum mutar ímóti. Í so máta er hetta lítið annarleiðis enn Gamla Testament. Men hjá okkum siga vit, at hesin bíbilski partur hoyrir til gomlu paktina. Í dag lesa kristin heldur Nýggja Testamenti. Henda samanbering kemur ikki fram í filminum.

Í einføldum, men effektivt ágangandi brotum verða vit mint á, hvussu djevulskt hóttandi islamska trúgvin er. Tá vesturlendsku líkini eru sum flest, verður *Åses Død* hjá Grieg smurd omanyvir. Tølandi, sum á einum vekingarmøti hjá einum speed predikanti. Heldur ikki henda samanbering verður gjørd.

**Bíligar tíðir**

Í heila taki er filmur Wilders ein einoygdur og eindimensionalur vitnisburður frá eini bangnari sál, ið er um at missa trúnna á alt og sjálvan seg. Tó, ikki ber til at siga, at boðskapurin er grunnur. Tann ræðsla og angist, sum Wilders leggur fyri dagin í hesum filmi, er djúp. Hetta er bládýpi. Men onkursvegna kenni eg á mær, at bládýpið verður sáað við beráddum huga. Wilders *vil* ikki skilja muslimar. Hann vil skilja seg *frá* teimum. Undir einum eru tey orsøkin til allan heimsins djevulskap í okkara tíð. Tað er boðskapur Wilders. Í somáta er hetta eitt ekkó, vit fyrr hava hoyrt av evropeiska meginlandinum.

Tað áhugaverda við filminum *Fitna* liggur uttanfyri sjálvan filmin. Tað er útbreiðslan og umrøðan, sum politikarin Wilders, við altjóða journalistiskari hjálp, hevur eydnast at skapt - úr ongum. Tí her er einki nýtt. Filmsbrotini hava vit øll sæð áður. Tey eru sett saman úr sjónvarpstíðindum seinastu árini. Gamaní eru hetta staðfestingar av álvarsligum hendingum. Men tað er ikki islam í sjálvum sær, sum er atvoldin. Enn minni Koranin í sjálvum sær. Tað eru ekstremistar, tey víðgongdu sjónarmiðini, sum dag og dagliga elva til, at vit skulu kannast í høvd og reyv, bara vit fara umborð á Atlantsflog.

Eins bílig og mannalív eru hjá hesum djevulsettu ekstremistum, eins bílig eru frásøgukynstrini hjá fólkavalda propagagandistinum Wilders. Vit liva í bíligum tíðum. Og hesin biografur er púra ókeypis og røkkur inn í hvørja stovu.

Guð forbarmi seg!

*Kelda:*
*www.birkblog.blogspot.com*




*Tað áhugaverda við filminum "Fitna" er umrøðan, sum politikarin Geert Wilders, við altjóða journalistiskari hjálp hevur megnað at skapt – úr ongum, heldur filmsummælarin, Birgir Kruse*

*Mynd: Polfoto*